# BÝRÁÐSFUNDUR

**Dagfesting:** 30.05.2016 kl. 17:00

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Anna Brattaberg Samuelsen
Dánjal Bjarkhamar
Heri Hjelm
Poul W. Augustinussen
Eyðbritt Krosslá

Ikki møtt: Eydis Kjærbo, fráboðað
Conrad Gaard Joensen, fráboðað
Tórður Poulsen, fráboðað, Møtti til mál 39/16

Nevndarskrivari: Petry Joensen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 32/16 | 16/00161-3 | Roknskapur & protokoll 2015 hjá kommununi | 3 |
| 33/16 | 13/00277-10 | Leigugrund undir Páls Høll | 3 |
| 34/16 | 14/00223-8 | Toftahagi, parkeringspláss við Toftarætt | 4 |
| 35/16 | 16/00036-3 | Keyp av lendi matr. nr. 211 og 250a | 4 |
| 36/16 | 16/00070-2 | Sundurbýti av Matr. 5a, Nes Vágur | 5 |
| 37/16 | 16/00095-3 | Marknaumskipan Diana Dahl og Eyðun V. Joensen | 6 |
| 38/16 | 16/00099-3 | Byggiloyvi, Finn og Rannvá Johannesen | 7 |
| 39/16 | 16/00104-2 | Eykajáttan til Fjarlestur & íløguna í VágsHøll og flyta játtan hjá Vágs Ítr ráð | 8 |
| 40/16 | 16/00131-2 | Felagið South Pelagic biðjur um akkord | 9 |
| 41/16 | 16/00116-2 | Beinisvørð biðjur um avtalu viðv gamlari skuld | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 42/16 | 16/00059-3 | Mannagongd viðv. setanum í Musikkskúlanum í Suðuroy | 11 |
| 43/16 | 16/00170-2 | Matstovu- og skeinkiloyvið til ummælis | 11 |
| 44/16 | 16/00158-3 | Umsókn um prinsipielt byggiloyvið til Multihøll á Oyrunum | 12 |
| 45/16 | 16/00156-3 | Umbøn um stuðul til ger av forprojekti til multihøll inni á Oyrunum í Vági | 13 |

## 32/16 Roknskapur & protokoll 2015 hjá kommununi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 32/16 | 16/00161-3 |

Stutt kann sigast at samlaði roknskapurin er betur enn mett í FÆ2015, 6.274 mió kr í mun til 4.270 mió kr. Men yvirtrekk er á §2 og §7. Høvuðsorsøkirnar til yvirtrekkini eru á Eldraøkinum (§2) og avseting móti tapi av skuldarum á Vágs Havn (§7).

Roknskapurin vísur rakstrarútreiðslur á 46.525 mió kr. Inntøkur á 58.489 mió kr. Íløgur á 5.690 mió kr. Hetta gevur eitt RLÚ á 6.274 mió kr í mun til 4.270 í Fíggjarætlanini fyri 2015.

Afturgjald av skuld er 5,1 mió kr. Hetta er fyri lánið í Suðuroyar Sparikassa, lánið fyri Hamragarð og útreiðslur til BankNordik ísv umlegging av lánum við endan av 2014. Munurin millum FÆ og roknskap er SWAP´ur í BN.

Skattainntøkurnar eru nakað hægri enn mett, td var gamal skattur 1,8 mió kr har avsett var 0,5 mió kr..

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Roknskapur góðkendur og grannskoðanarprotokollat lisið upp á fundinum.

## 33/16 Leigugrund undir Páls Høll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 33/16 | 13/00277-10 |

Vágs Býráð samtykti í 2013 at leiga Sjálvsognarstovninum Páls Høll økið inni á Oyrunum á matr.nr. 596a til støddar 4.900 $m^2$.

Síðani hevur tað víst seg, at eitt økið matr. nr. 549a á áleið 900 $m^2$ liggur beint inni í avsetta økinum og er Hamrahagi ognari av hesum matrikul.

Páls Høll er matrikulera til 596h á 2802 $m^2$ sum bert er bygningurin.

Hetta er ikki í tráð við býráðssamtyktina, og grunda á hetta verður málið lagt aftur fyri býráðið.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Dennis Holm var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan. Dánjal Bjarkhamar leiddi fundin í hesum málið.
Einmælt samtykt at taka undir við at matrikulering verður sum hon er framd. Páls høll leigar økið uppá 2802 $m^2$, sum er lendið undir bygninginum og hevur matr. nr. 596h..

## 34/16 Toftahagi, parkeringspláss við Toftarætt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.05.2016 | 20/16 | 14/00223-8 |
| 2 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 34/16 | 14/00223-8 |

Nýggja stýrið fyri Toftahaga hevur verið á fund við teknisku umsiting og umrøtt spuringin um økið sum bleiv tikið til parkeringspláss í 2006/07. Økið fevnir um 730 fermetrar. Á fundinum gjørdi hagastýrið greitt at tey forvænta í minsta lagið kr. 100.000.- fyri økið, svarandi til eitt stórt grundstykkið. Fyrisitingin hevur lagt fram at VK hevur vegleiðandi prísir hjá Landsverk at halda seg til, í hesum føri kr. 69,00/m², umframt kr. 4,80/m² fyri vetrarbit. Sostatt fer VK væntandi at bjóða Toftahaga kr. 53.874.- fyri økið. (730 x 69+4,8) Tekniska fyrisitingin mælir til at nevndin heldur seg til vegleiðandi prísin frá Landsverk.

**Tekniska nevnd 09. maj 2016:**
Tekniska nevnd mælir til at bjóða Toftahaga tann prísin sum umsitingin vísir til, tvs. Vegleiðandi prísir frá Landsverk.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Heri Hjelm metti seg ógegnigan.
Samtykt við 5 atkvøðum at taka undir við Teknisku nevnd.

## 35/16 Keyp av lendi matr. nr. 211 og 250a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 35/16 | 16/00036-3 |

Vágs kommuna hevur í 2016 sett pening av og haft ætlanir um, at fara víðari við vegagerð í Geilini (vestara partin).
Í hesum sambandi er neyðugt at keypa av ognini matr.nr. 211 og 250a ílat 108 fermetrar. Eigararnir eri Malena og Eivind Weyhe, og hava eigararnir játta hesum.

Malt verður til at Vágs kommuna keypir hesar 108 fermetrar fyri alment ásetta fermetraprísin

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Samtykt við 5 atkvøðum fyri at keypa lendið. Heri Hjelm atkvøddi ikki.

## 36/16 Sundurbýti av Matr. 5a, Nes Vágur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.05.2016 | 22/16 | 16/00070-2 |
| 2 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 36/16 | 16/00070-2 |

Eigarar av Matrikul 5a, Nes/Vágur hava søkt um loyvi at selja burturav matr. 5a, keypari er Johannes Sumberg Nysted. Tað framgongur ikki av umsóknini hvat ætlanin er við keypinum. Sambært byggisamtyktini er økið flokka sum bústaðarøki.

**Tekniska nevnd 09. maj 2016:**
Tekniska nevnd tekur undir við umsóknini um sundurbýti.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt at taka aftur við hesum.

# 37/16 Marknaumskipan Diana Dahl og Eyðun V. Joensen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.04.2016 | 18/16 | 16/00095-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.05.2016 | 25/16 | 16/00095-3 |
| 3 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 37/16 | 16/00095-3 |

Diana Dahl og Dan Djurhuus søkja um at umskipa Matr. 403c og Matr. 408 í samráð við Eyðun V. Joensen. Tey vilja keypa umrødda stykkið og marknaumskipað, sum víst í hjáløgdum skjali. Uppskot 1 er at fremja eina markna-umskipan. Uppskot 2 er at fremja eitt sundurbýti og eftirfylgjandi samanlegging.

**Tekniska nevnd 11. april 2016:**
TN mælir til at umsitingin kannar um tað sum eftir er av Matr. 403c verður ov lítið um ætlaða marknaumskipanin verður framd. Málið kemur fyri aftur á næsta fundi í TN.

**Nýtt í málinum, 3. mai 2016**
Byggistigi á Matr. 403c (Eyðun V. Joensen) broytist við tað at stykkið verður væl minni. 207m², ímóti verandi 679 m².
Byggistigi verður eftir hesa umskipan 33% og er nøktandi sambært byggisamtyktini (max. 50%), fyri bygging í økinum A1 ið umfatar gomlu bygdina.
<u>Hinvegin avmarkar tað framtíðar umbygging á matrikul 403c.</u>
Umhvørvisstovan loyvir ikki marknaumskipan, men mælir til sundurbýti og eftirfylgjandi samanlegging.

**Tekniska nevnd 09. maj 2016:**
Tekniska nevnd tekur undir við umsóknini.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

## 38/16 Byggiloyvi, Finn og Rannvá Johannesen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.05.2016 | 26/16 | 16/00099-3 |
| 2 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 38/16 | 16/00099-3 |

Finn og Rannvá Johannesen søkja um byggiloyvi til umfatandi víðkan av húsum teirra, Matr. 487b. Tekningar eru viðfestar. Byggistigið er 0,36 og tað samsvarar við byggisamtyktina. Parkeringsviðurskiftini eru nøktandi.
Fjarstøðan til mark er ikki nøktandi, men grannar norðureftir hava játtað at tey byggja so tætt í mark, grannaloyvi fyrilyggja. Tekniska nevnd má taka støðu til um fjarstøðan ímóti kommunumarki/vegi er nøktandi.

**Tekniska nevnd 09. maj 2016:**
Tekniska nevnd tekur undir við at lata byggiloyvi sambært innsendum tekningum.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og víkja frá kravdu fjarstøðuni móti vegnum.

## 39/16 Eykajáttan til Fjarlestur & íløguna í VágsHøll og flyta játtan hjá Vágs Ítr ráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.05.2016 | 44/16 | 16/00104-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2016 | 50/16 | 16/00104-2 |
| 3 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 39/16 | 16/00104-2 |

Mælt verður til at flyta játtanir frá Vágs Ítróttarráð til rakstur og íløgur á Eiðinum, ávíkavist kr 1.100.000 og kr. 512.000. Hetta "kostar" onki, men verður flutt av Vágs Ítróttarráð tí kommunan hevur yvirtikið hetta pr 1 jan 2016. Hetta skal ikki fyri aðrar nevndir / fundir, tí flytingin er "intern" á §5, sum Mentanarnevndin varar av.

Út frá bókaðum tølum 3 mðr 2016 sær tað ikki út til at játtanin fer at halda. Mælt verður til at játtað kr 150.000 til Fjarlestrardepilin og kr 388.000 til íløguna vesturi í høllini. Báðar eykajáttanir skulu fíggjast av innistandandi. Um eykajáttanirnar ikki verða latnar mugu ábyrgdarpersónarnir beinanvegin fáa boð um at spara ella gera onnur átøk, soleiðis at núverandi játtanir fyri 2016 halda.

**Mentanarnevndin 09. maj 2016:**
MN tekur undir við tilmælinum um at flyta ímillum konti á gein §5. Eisini tekur nevndin undir við eykajáttan til Fjarlestrardepilin og beinir málið í FN.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2016:**
Einmælt samtykt.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**

Tórður Poulsen møtir á fundi.
Einmælt samtykt at taka undir við hesum, og veita eykajáttan av innistandandi.

# 40/16 Felagið South Pelagic biðjur um akkord

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2016 | 53/16 | 16/00131-2 |
| 2 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 40/16 | 16/00131-2 |

Christian Andreasen (CA), adv, ringdi til Pól Thorsteinsson (PT) og spurdi um kommunan vil góðtaka at fáa 25% av áognini ímóti at avskriva restina. Hartvig Joensen (HJ) sendi síðani skjalið til PT, sum kommunan skal undirskrivað um tikið verður undir við akkordini.

CA segði, at fleiri havnir (td Runavík) hevur takka ja til avtaluna. CA segði eisini, at Alex var tikin av ræði, og at Havsbrún / HJ royndi at bjarga felagnum við hesi avtaluni.

Um ikki allir kreditorar taka av er ongin avtala. Kommunan hevur fyrr sagt nei takk til slíkar avtalur, td mál 14/00159 viðv. Sancy Trawl.

PT segði við CA, at vanliga segði kommunan nei til hesar avtalur, tí kommunan hevur hildið seg til líkheits-prinsippið, altso at øll skulu gjalda sína skuld til kommununa. CA vísti á, at kommunan eisini eigur at tryggja at kommunan fær allar teir pengar inn, sum hon uppá nakran máta kann.

Saldo 29 apríl 2016 er kr. 189.495,65. 25% av tí er áleið kr. 47.000. Alt eldri enn 2015 er avsett sum tap.

12 mai hevur felagið goldið tey 25%. VK má tískil avskriva restsaldo á kr. 142.121,74.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2016:**
Samtykt gjørd umvegis teldupost verður hervið staðfest. Málið verður lagt fyri býráðið.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt.

## 41/16 Beinisvørð biður um avtalu viðv gamlari skuld

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2016 | 51/16 | 16/00116-2 |
| 2 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 41/16 | 16/00116-2 |

Sancy Trawl hevur sent kommununi skriv har teir skjóta upp, at gjalda kr 100.000 í einum, um kommunan vil eftirgeva restina. Samlaða skuldin tann 21.04.2016 er kr 318.581,44. Alternativt spyrja teir um kommunan vil "frysta" skuldina til juni 2019 (tað er reelt at leingja verandi avtalu við 2½ árum).

Teir hava skrivliga avtalu um, at samlaða skuldin ongantíð skal fara uppum kr 319.000. Tað avtaluna halda teir hampuliga væl. Avtalan gongur út tann 31.12.2016, og tá fellur væl øll skuldin til gjaldingar, men tað klára teir neyvan.

Skuldin hevur fylgt við felagnum síðan aðrir eigarar áttu Beinisvørð. Uml kr 260.000 av skuldini er eldri enn 01.01.2016.

Fíggjarleiðarin mælir frá, at takka ja til kr. 100.000 í einum. Kanska kann kommunan ístaðin bjóðað teimum at gjalda kr. 250.000 í einum.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2016:**
Einmælt samtykt at mæla til at teir gjald 100.000,00 kr. nú, skuld uppá 200.000,00 kr. verða frystar niður til juni 2019 og restin verður avskrivað.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

## 42/16 Mannagongd viðv. setanum í Musikkskúlanum í Suðuroy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.03.2016 | 26/16 | 16/00059-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 31/16 | 16/00059-3 |
| 3 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 20/16 | 16/00059-3 |
| 4 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 42/16 | 16/00059-3 |

Umboðsmaðurin hevur sent álit viðv. mannagongd av setanum av musikkskúlanum í Suðuroy.

**Mentanarnevndin 07. marts 2016:**
MN beinir málið í býráðið, og mælir til at setanartilgongdin verður gjørd av nýggjum. Eisini hevði verið hóskandi at umboðið hjá Vágs Kommunu, Sólrun Mohr, bleiv spurd um hesa tilgongd.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at taka niðurstøðuna frá Umboðsmanninum til eftirtektar. Kommunan vendir sær til Mentamálaráðið, og kannar um og nær lógin verður broytt.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini. Málið verður tikið upp á fyrst komandi fundi eftir at Vágs kommuna hevur frætt aftur frá Mentamálaráðnum.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt at heita á nevndina fyri Musikkskúlan at lýsa starvið leyst nú, og at nevndin er setunarbólkur sum sendir tilmælið til kommunustýrini at taka støðu til.

## 43/16 Matstovu- og skeinkiloyvið til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 43/16 | 16/00170-2 |

Dan Djurhuus eigari av matr.nr. 484b hevur latið Politinum umsókn um matstovu- og skeinkiloyvið og vil í tí sambandi eisini søkja Vágs kommuna um ummælið í málinum.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt at viðmæla hesum.

# 44/16 Umsókn um prinsipielt byggiloyvið til Multihøll á Oyrunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 44/16 | 16/00158-3 |

Vágs Ítróttarráð hevur havt fund um ætlan at byggja multihøll inni á Oyrunum í Vági.

Í hesum sambandi hevur Vágs Ítróttarráð samtykt:

- at søkja Vágs kommunu um stuðul á í mesta lagi 200.000 kr. til at gera forprojekt í smb. multihøll inni á Oyrunum í Vági.

- at søkja Vágs kommunu um prinsipielt byggiloyvið, tvs. biðja um økið inni á Oyrunum sum er umleið 5.000 m$^2$ støddar at byggja multihøllina á. (Vágs Ítróttarráð vil venda aftur til Vágs kommunu við endaligum byggitekningum vm., tá søkt verður um endaligt byggiloyvið.)

Tekniska nevnd verður at taka støðu til partin viðv. prinsipiellum byggiloyvið, heitt verður á limirnir í TN um at svara umvegis teldupost hvørja støðu tit hava til málið, so verður málið staðfest á komandi fundi í nevndini.

Borgarstjórin ynskir málið fyri á býráðsfundi 30. mai, og tí er neyðugt at avgreiða hetta umvegis teldupost.

Havnanevndin hevur samtykt at taka undir við at útvega økið, men støða er ikki tikin til hvussu.

Allir limirnir í Teknisku nevnd hava umvegis teldupost 18. mai svara játtandi uppá, at tey taka undir við at geva prinsipielt byggiloyvið.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt.

# 45/16 Umbøn um stuðul til ger av forprojekti til multihøll inni á Oyrunum í Vági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 45/16 | 16/00156-3 |

Vágs Ítróttarráð hevur havt fund um ætlan at byggja multihøll inni á Oyrunum í Vági.

Í hesum sambandi hevur Vágs Ítróttarráð samtykt:

- at søkja Vágs kommunu um stuðul á í mesta lagi 200.000 kr. til at gera forprojekt í smb. multihøll inni á Oyrunum í Vági.

at søkja Vágs kommunu um prinsipielt byggiloyvið, tvs. biðja um økið inni á Oyrunum sum er umleið 5.000 $m^2$ støddar at byggja multihøllina á. (Vágs Ítróttarráð vil venda aftur til Vágs kommunu við endaligum byggitekningum vm., tá søkt verður um endaligt byggiloyvið.

Mentunarnevndin verður at taka støðu til partin viðv. at játta stuðul í mesta lagi 200.000 kr. til at gera forprojekt í smb. multihøll inni á Oyrunum í Vági

Heitt verður á limirnir í MN um at svara umvegis teldupost um tit taka undir við hesum, so verður málið staðfest á komandi fundi í nevndini.

Um Metnunarnevndin játtar umbidna stuðul, verður mælt til at hetta verður játtað av innistandandi.

Málið skal leggjast fyri býráðið og hava tvinnar viðgerðir. Borgarstjórin ynskir málið fyri á býráðsfundi 30. mai, og tí er neyðugt at avgreiða hetta umvegis teldupost.

Allir limirnir í Mentunarnevndini hava umvegis teldupost svara játtandi uppá, at tey taka undir við at veita umbidna stuðulin.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**
Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Anna Brattaberg Samuelsen |
| Conrad Gaard Joensen | Dánjal Bjarkhamar | Heri Hjelm |
| Poul W. Augustinussen | Tórður Poulsen | Eyðbritt Krosslá |